J&K pf J. & K. Petersen Contractors



-ALT ENTREPRENØR / BYGGIARBEIÐI VERÐUR GJØRT

J&K pf J. & K. Betong




- VIT LEVERA BETONG UM ALT LANDIÐ

tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | mail: jkp@jkp.fo



# Fiskaprísurin stýrir fiskiskapinum

**Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, ásannar, at vánaligu fiskaprísirnir eru við til at stýra fiskiskapinum í løtuni, soleiðis at meira verður roynt eftir toski og hýsu og minni eftir upsa. - Hetta er ikki so heppið, nú toskafiskiskapurin er minkandi, heldur hann**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, bíðar nú eftir tilmælunum hjá Fiskirannsóknarstovuni og Fiskidaganevndini, sum skulu geva honum tilmæli um fiskidagarnar komandi fiskiár.

Landsstýrismaðurin væntar, at tað fyrra tilmælið kemur 15. juni og tað seinna 22. juni.

– Tað plagar at vera soleiðis, sigur Bjørn, at Fiskirannsóknarstovan mælir til ávísar skerjingar, meðan Fiskidaganevndin oftast mælir til at halda fram við verandi fiskidøgum.

Enn hevur hann tó einki fingið at vita um, hvørji tilmælini verða í ár.

Bjørn sigur, at enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvussu nógvir fiskidagarnir í ávísu skipabólkunum verða komandi fiskiár, og hann torir heldur ikki at geva nakað boð uppá, um talan verður um skerjingar, ella um dagarnir verða teir somu í tali, sum í verandi fiskiári.

Hann heldur tað kortini vera óhugsandi, at talan verður um nakra øking í fiskidøgunum.

– Tá ið eg havi fingið tilmælini, fari eg at hyggja tey væl og virðiliga ígjøgnum, og tá ið tað er gjørt, tekur landsstýrið støðu til hesar.



*Landsstýrismaðurin hevur heft seg við, at fiskurin í seinastuni hevur verið rakari enn vanligt. - Hetta mugu vit meta sum eitt tekin um, at náttúruviðurskiftini ikki eru okkum til vildar, heldur hann*

Bjørn ásannar, at niðurgongd er í veiðini eftir eitt nú toski.

– Vit mugu staðfesta, at góði toskafiskiskapurin, vit hava havt nú í fleiri ár, ikki er hin sami. Tó kunnu vit ikki siga, at veiðan er vánalig, men meira soleiðis, at hon er komin niður ímóti tí, hon plagar at vera eitt vanligt ár.

Landsstýrismaðurin hevur heft seg við, at fiskurin í seinastuni hevur verið rakari enn vanligt, og hetta mugu vit meta sum eitt tekin um, at náttúruviðurskiftini ikki eru okkum til vildar.

Hann hevur eisini heft seg við úrslitið av teimum gróðurkanningum, sum Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt seinastu árini.

– Seinastu árini hava víst, at lítil gróður hevur verið í sjónum, men í fjør var ein bati aftur at hóma. Vit kunnu tí bert vóna, at gróðurin er uppaftur betur í ár enn seinasta ár, men tað vita vit ikki enn.

Landsstýrismaðurin heldur, at gróðurin er eitt ávíst barometur fyri, hvussu lívsgrundarlagið hjá fiskinum er.

Hann heldur tískil, at hesi viðurskifti hava stóran týdning fyri, hvat kemur undan gýtingini, sum verið hevur í vár.

– Sum eg havi skilt, hevur tilgongdin av fiski sum heild verið hampiliga góð seinastu árini.

### Vánaligir prísir

Bjørn Kalsø ásannar, at vánaligu fiskaprísirnir eru við til at stýra fiskiskapinum í løtuni, soleiðis at meira verður roynt eftir toski og hýsu og minni eftir upsa.

Upsin hevur leingi havt ógvuliga lágan prís, og haraftrat hevur hann verið smáur og rak.

Landsstýrismaðurin sigur, at hetta hevur ført við sær, at partrolarar, sum annars veiða upsa, í størri mun enn áður hava roynt eftir toski.

– Tann parturin av ísfiskaflotanum, sum hevur tað truplast í løtuni, er partrolaraflotin, sum seinasta árið hevur havt eitt munandi minni veiðivirðið enn undanfarin ár.

Bjørn sigur, at nógvur upsi hevur verið at fingið, men tá ið so lítið fæst fyri fiskin, er hesin fiskiskapur eisini minni áhugaverdur fyri trolaraflotan.

– Hetta merkir, at trýstið á toskastovnin veksur, og tað er neyvan so heppið, nú toskafiskiskapurin er í minking.

Landsstýrismaðurin er sannførdur um, at vit eiga at veiða so nógv sum tilber, tá ið nógvur fiskur er at fáa.

– Men tá ið niðurgongd er, noyðast vit sjálvsagt at ansa eftir, at vit ikki ganga stovninum ov nær.

### Ringt at spáa

Hann heldur, at tað mangan er torført at spáa um gongdina frameftir og vísir til kreppuárini fyri góðum 10 árum síðan, tá ið lítil og eingin fiskur var at fáa.

– Hvaðani toskurin fór, og hvussu hann kundi koma aftur í so stórum nøgdum uppá so stutta tíð, er mongum ein gáta. Onkur hevur nevnt veðurlagið hesi árini, og onkur annar hevur nevnt, at toskurin fer, har hann fær nakað at eta, sigur landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø.



*– Tann parturin av ísfiskaflotanum, sum hevur tað truplast í løtuni, er partrolaraflotin, sum seinasta árið hevur havt eitt munandi minni veiðivirðið enn undanfarin ár, sigur Bjørn Kalsø*

## Frakland keypir feska hýsu

**Frakland:** Tað er veksandi áhugi fyri feskari hýsu í Fraklandi.

Seinastu tvey árini er útflutningurin av norskari hýsu til Fraklands vaksin við 270 tonsum. Hetta er ikki eitt stórt tal, men kortini eitt prógv um, at áhugin fyri feskari hýsu í Fraklandi er veksandi.

Í tíðini, januar til mars 2003, sendu norðmenn 398 tons av hýsu til Fraklands. Somu mánaðir í ár var talið 684 tons tons.

Fiskakeyparar í Fraklandi síggja hýsuna sum eitt alternativ til hvítingin, sum er minkaður í nøgd.

**-vj.**



## Prísurin á fiskamjøli økist

Peru og Chili: Teir, sum meta um prísútlitini á fiskamjøli, siga, at prísurin kann fara at seta met. Tað merkir, at hann kann koma uppá á 750 dollarar fyri tonsið. So høgur hevur prísurin ikki verið seinastu fýra árini.

Sambært chilenskum bløðum var prísurin um ársskiftið 665 dollarar fyri tonsið. Tað merkir, at prísurin øktist við 9% í fjør.

Í mars í ár var prísurin komin uppá 725 dollarar, og hann vaks framhaldandi.

Tí eru marknaðarútlitini fyri fiskamjøli góð.

Peru er heimsins størsti framleiðari av fiskamjøli við millum 1,5 og 2 miljónum tonsum um árið. Á øðrum plássi kemur grannalandið, Chili, ið hevur eina framleiðslu, sum er 700.000 tons um árið.

Hóast útlit fyrr í ár vóru fyri øktum prísum á fiskamjøli, høvdu hvørki íslendskir ella føroyskir fiskamjølsframleiðarar tá merkt nakað til øktar prísir.